# Bóndin á Kjalnesi stillar upp

UPPSTILLING
*ingi@sosialurin.fo*

Listin hjá Norðstreymoyar Javnaðarfelag er liðugur og sær soleiðis út: Hans Pauli Strøm, samfelags-frøðingur, Vestmanna; Soffi Egholm, psykoterapeutur, Leynar; Eddie Hjartvar Joensen, bóndi, Kollafjørður; Gunnvá Mortensen, skrivari, Hósvík.

Seinasta val fall Hans Pauli Strøm, sum hevði sætið í løgtinginum. Hann fekk annars 195 persónligar atkvøður. Flokkurin fekk 480 atkvøður tilsamans.

Menninir úr Norðstreymoyar valdømi fullu til Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin. Næstur Javnaðarflokkinum var Fólkaflokkurin, sum fekk 535 atkvøður.

# Sambandsflokkurin í Havn heldur seg til tað trygga

UPPSTILLING
*ingi@sosialurin.fo*

Nógv hevur verið tosað um jokarar og nýggj valevni síðstu dagarnar. Men Sambandsflokkurin, sum sambært veljarakanningunum, dregur ongar kaninir upp úr hattinum. Í Havnini, har flokkurin gjørdist næststørstur seinasta val, satsar flokkurin upp á tað trygga.

Føroya Væl hevur stillað hesi valevnir upp til løgtingsvalið 20. januar 2004: Lisbeth L. Petersen, løgtingskvinna, Heðin Mortensen, løgtingsmaður, Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, Høgni Mikkelsen, býráðslimur, Annfinn Brekkstein, borgarstjóri, Súsanna Dam, bankakvinna, Jacob Holm, stýrimaður, Jóhan Petur Johannesen, lærari, Michael Jensen, inspektørur, Bjarti Thomsen, sivilverkfrøðingur, og Janus Djurhuus, arbeiðsformaður Tórshavn

Sambandsflokkurin fekk 2989 atkvøður síðsta val. Nógv flestar atkvøður fekk forkvinnan í flokkinum, Lisbeth L. Petersen, sum var toppskorari á valinum. Hon fekk 1394 atkvøður. Næst henni kom Heðin Mortensen, sum fekk 410 atkvøður. Kaj Leo Johannesen, sum fekk 263 atkvøður, kom eisini á ting sum eykavaldur.

# Heini og Karsten stilla uppaftur

UPPSTILLING
*ingi@sosialurin.fo*

Norðoya Tjóðveldisfelag hevur havt sín 2. og 3. uppstillingarfund. Góð 80 fólk vóru á fundi á Sjómansheiminum. Fundurin var góður og hugurin at taka orði treyt ikki, verður sagt.

Einki óvæntað stakk seg upp, tá ið listin var klárur. Tey, sum eru uppstillað til løgtingsvalið 20. januar eru: Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, Karstin Hansen, fyrrv. landsstýrismaður við fíggjarmálum, Olga Biskopstøð, samfelagsfrøðingur, Rani Nolsøe, menningarstjóri, Signy Hansen, flakakvinna, Jancy B. Klein, leiðari, og Hanus Hansen, lækni.

Við síðsta val fekk Tjóðveldisflokkurin í Norðoyggjum 900 atkvøður. Flokkurin fekk ein mann á ting, sum gjørdist Heini O. Heinesen. Hann fekk 329 atkvøður og hevur verið løgtingsmaður síðan 1984. Honum á baki kom Karsten Hansen við 283 atkvøðum. Hann hevur havt fíggjarmál um hendi í landsstýrinum síðan 1998. Nummar trý á listanum var Olga Biskustøð við 98 atkvøðum.

# Sambandið eigur Vágar

UPPSTILLING
*ingi@sosialurin.fo*

Vágar hava fingið samband. Men Sambandið hevur leingi havt Vágar.

Vága Sambandsfelag gjørdi valevnislistan lidnan á fundi í Miðvági í hóskvøldið. Á listanum eru hesi valevni: Marjus Dam, løgtingslimur, Miðvágur, Sune Jacobsen, Sørvágur, Gunnar K. Nattestad, Bøur, og Rósa Samuelsen, Sandavágur.

Talan er stórt sæð um sama lista sum seinast, men Rósa Samuelsen er komin afturat. Hon er borgarstjóri í Sandavági. Seinasta val var Marjus Dam valdur við 311 atkvøðum. Nummar tvey var Gunnar K. Nattestad við 143 atkvøðum. Sambandsflokkurin fekk tilsamans 699 atkvøður og ein mann valdan.

Tann eini maðurin er tryggur. Avbjóðingin er at fáa báðar valdar, siga sambandsfólk.

# Aliloyvi kunnu pantsetast



*Við avgerðini hjá Eystara Landsrætti er ein munandi forðing fyri einari framhaldandi fígging av alivinnuni fingin av vegnum, sigur Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya banka*

**Landsrætturin hevur felt dóm, sum sigur, at aliloyvi kunnu pantsetast. Tað er ein stórsigur fyri lánveitararnar, sum sostatt kunnu fáa trygd í aliloyvum. Við hesum er ein forðing fyri framhaldandi fígging av alivinnuni fingin av vegnum, sigur Føroya banki**

ALIVINNAN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Ein alari hevur loyvi til at geva sínum lánveitara pent í aliloyvinum. Og myndugleikarnir kunnu ikki nokta fyri at tinglýsa pantsetingina. Tað staðfestir Eystari landsrættur í dómi frá 15. desember.

Hetta er ein sigur fyri peningastovnarnar, sum í fleiri ár hava borið tað sjónarmið fram, at alarar kunnu geva sínum lánveitara pant í aliloyvinum. Tað merkir hinvegin ikki, at lánveitarin, sum er panthavari, hevur betri rætt enn alarin, sum er pantsetari.

Ítøkiliga málið byrjaði við, at ein av kundunum hjá Føroya Banka við einum eigarapantibrævi tann 20. august 2003 gav bankanum pant í sínum rætti at ala á sjónum og at reka smoltstøð.

Føroya rættur feldi dóm 22. oktober, har gingið var ímóti, at aliloyvið kundi pantsetast. Víst var til lóg nr. 70 um aling av fiski frá juni 1998. Føroya rættur grundaði sína avgerð á, at talan var um eitt alment loyvi, sum ikki kann latast víðari. Hvørki við sølu ella panstseting.

Hesa avgerð kærdi Føroya banki til Eystara landsrætt, sum hevur givið bankanum viðhald. Landsrætturin ger galdandi, at loyvi til at ala fisk er at meta sum ein umsetiligur ognarlutur. Avgerðina grundar Landsrætturin á, at tað er neyðugt hjá vinnulívinum at nýta aliloyvi sum eitt kredittgrundarlag. Landsrætturin leggur samstundis dent á, at tað, at landsstýrið skal geva loyvi til at selja eitt aliloyvi, ikki forðar fyri einari pantseting av aliloyvinum.

– Við avgerðini hjá Eystara Landsrætti er ein munandi forðing fyri einari framhaldandi fígging av alivinnuni fingin av vegnum. Hinvegin er loyvi til at pantseta aliloyvi ikki nóg mikið til at tryggja vinnuni eina framtíð, sigur Jørn Astrup Hansen.

Síðan lækkandi prísir og ILA raktu alivinnuna er støðan nógv broytt hjá vinnuni, sum hevði nøkur gullár. Eginorgnin er horvin sum døgg fyri sól, og tí er tørvurin hjá lánveitaranum at fáa pant í loyvi, tá ið teir fíggja alibrúk, størri enn nakrantíð.

– Við dóminum hava vit fingið tað, sum vit hava biðið um. Tað fara vit at brúka til at biða um pant, hvørja ferð vit veita fígging. Hetta var stutt og greitt eina fyritreyt fyri, at vit framhaldandi kunnu veita fígging, og tí er hetta ein stórsigur fyri alivinnuna, sigur Jørn Astrup Hansen.

# Atli út og Helgi inn

**Atli Hansen er farin av listanum og Helgi Abrahamsen er komin á listan hjá Sambandsflokkinum í Eysturoynni, sum fekk flestar atkvøður seinasta val. Atkvøðuslúkarnir halda fram**

UPPSTILLING
*ingi@sosialurin.fo*

Háborgin hjá Sambandsflokkinum hevur altíð verið í Eysturoynni. Seinasta val fekk flokkurin 2031 atkvøður í Eysturoynni, sum svarar til 31 prosent av atkvøðunum. Tað gav tveir menn, Alfred Olsen og Edmund Joensen, sum báðir stilla uppaftur.

Edmund Joensen hevur verið løgtingsmaður hetta valskeiðið. Hesin sessur hevur síðstu árini verið síðsta politiska skreytin hjá hansara undanmonnum, men hann heldur tað vera ov tíðliga at gevast í politikki.

– Løgtingið hevur eisini brúk fyri royndum kreftum. Onkur skal føra arvin víðari, tey ungu hava áræðið og vit eldru hava royndirar. Eg haldi sjálvur, at eg eri í best aldri, og tí havi eg ongar ætlanir um at gevast í politikki, sigur Edmund Joensen.

Trý nýggj valevni eru á listanum. Teirra millum er Helgi Abrahamsen, sum er floksskrivari hjá Sambandsflokkinum. Hann hevur javnan gjørt vart við seg í almenna kjakinum og hevur staðið fyri heimasíðuni hjá flokkinum, sum er nógv vitjað. Av listanum er farin Atli Hansen, sum sat á tingi árini frá 1994-1998 fyri Edmund Joensen, sum tá var løgmaður.

Listin hjá Sambandsflokkin í Eysturoy sær soleiðis út: Helgi Abrahamsen, floksskrivari av Strondum, Edva Jacobsen, bankakvinna úr Fuglafirði, Edmund Joensen, løgtingsformaður av Oyrarbakka, Marja Lamhauge, verkfrøðingur úr Lamareiði, Reimund Langgaard úr Leirvík, Alfred Olsen, løgtingsmaður av Saltnesi, Frithleif Olsen, stjóri úr Rituvík, og Haldóra Ranghamar, sum er borgarstjóri í Gøtu.

Seinast var Alfred Olsen fyrstvaldur við 446 atkvøðum, og Edmund Joensen var næstvaldur við 432 atkvøðum. Nummar trý á listanum var Edva Jacobsen, sum fekk 198 atkvøður.



# Í nýggjum flokki við somu søk

**Helena Dam á Neystabø heldur seg ikki hava nakran trupulleika við at umboða Javnaðarflokkin, hóast hon var partur av fullveldissamgonguni frá 1998. Hon heldur hinvegin, at tað er ein grundleggjandi samanhangur millum tann politikk hon talaði fyri, og tann politikk, sum Javnaðarflokkurin ætlar at fremja í verki**



*Helena Dam á Neystabø heldur, at tað er ein grundleggjandi samanhangur millum tann politikki hon talaði fyri í Sjálvsstýrisflokkinum, og tann politikk, sum Javnaðarflokkurin ætlar at fremja í verki*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

UPPSTILLING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Vent í holuni. Hetta má vera ramasta lýsingin av støðuni hjá Helenu Dam á Neystabø í Javnaðarflokkinum. Undan løgtingsvalinum í 2002 stóð fyrrverandi løgtings- og landsstýriskvinnan í Sjálvsstýrisflokkinum fyri einum størri politiskum ósigri, tá tað ikki eydnaðist henni at koma á listan hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymi. Hóast fólk í ovastu leiðsluni í Javnaðarflokkinum og í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag ynsktu hana sum valevni, so vóru kortini sterkar kreftir í flokkinum, sum arbeiddu ímóti, at hon skuldi sleppa á listan. Søgurnar vóru mangar, um hví tað ikki eydnaðist Helenu á javnaðarlistan, men hetta hoyrir alt til fortíðina, og sjálv ynskir høvuðspersónurin ikki at gera stórvegis viðmerkingar til málið, tí nú ræður um at líta á frameftir.

– Ein samd nevnd heitti hesaferð á meg um, at gerast valevni hjá Javnaðarflokkinum til valið í januar, og eftir umhugsunartíð játtaði eg, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon brynjar seg nú til eitt hart og tætt valstríð, har stórur spenningurin verður um, hvør fær tingsess á sterka javnaðarlistanum í Suðurstreymi

## Grundleggjandi samanhangur

Undan løgtingsvalinum seinast, vóru tað fleiri sum hildu, at skotbráið frá, at Helena var partur av fullveldisskútini í føroyskum politikki og til, at hon ætlaði at stilla upp fyri Javnaðarflokkin, sum var mótpolur til fullveldispolitikkin, var alt ov stutt.

Høvuðspersónurin heldur seg hinvegin ikki hava nakran trupulleika við at umboða Javnaðarflokkin, hóast hon var partur av fullveldissamgonguni. Hon heldur tað er ein grundleggjandi samanhangur millum politikkin, sum hon talaði fyri tá og tann politikk, sum Javnaðarflokkurin ætlar at fremja í verki.

–Tey árini, eg havi sitið sum landsstýrismaður og løgtingslimur, vóru tað serliga tvey mál, sum høvdu mín áhuga. Hesi vóru sjálvsstýrismálið og vælferð hjá fólkinum í Føroyum. Eitt samfelag har tey veiku hava tað gott er eitt gott samfelag, og eitt samfelag, ið miðar eftir sjálvbjargni. Sum støðan er í føroyskum politikki í dag haldi eg, at Javnaðarflokkurin sameinar best hesi mál. Eg taki fult undir við sjálvsstýrislógini hjá flokkinum og at vit eiga at byggja føroyska samfelagið á samhaldsfastar vælferðarskipanir, greiðir Helena frá

## Skerdi blokkin

Sum landsstýriskvinna og løgtingslimur fyri Sjálvsstýrisflokkin var Helena Dam á Neystabø millum annað við til at skerja blokkstuðulin úr Danmark við góðum 300 mio. krónum. Hesa avgerð hjá sjálvsstýrissamgonguni setti Javnaðarflokkurin seg hart ímóti.

*Er hetta ein trupulleiki?*

– Javnaðarflokkurin var ímóti hesum niðurskurði, tað er rætt, men segði seg kunna taka undir við einum niðurskurði sum var minni. Hetta var eisini mítt útgangsstøði tá ið vit samráddust um hendan spurning. Eg eri ikki ósamd um, at skerjingin av blokkinum var í meira lagi. Men politikkur snýr seg í stóran mun um semjur. Sjálvandi áttu yvirtøkurnar at verið framdar líðandi yvir alt valskeiðið, tá hevði allur niðurskurðurin ikki komið í einum. Men sum øll minnast gekst illa at finna semjur í Føroyum, og enn verri at finna semjur millum Føroyar og Danmark. Júst tí er neyðugt sum skjótast at leggja eitt nýtt grundarlag undir einari tjóðaskaparligari semju, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon leggur afturat, at málið má sjálvsagt vera, at Føroyar gerast minni fíggjarliga heftar av Danmark,. Hetta mál metir hon vera í samsvar við stevnumið Javnaðarfloksins um at virka fyri fíggjarligum og fyrisitingarligum sjálvbjargni í Føroyum.

– Blokkurin má fyri alt ikki gerast flokkurin ella flokkurin blokkurin. Eg kann minnast, at Javnaðarflokkurin fór til valið í 1998 fyri at loysa sjálvsstýrismálið, og flokkurin fekk eitt gott val. Vit mugu ikki sleppa hesum máli nú, og sjálvsstýrismálið má um alt sameinast við ein hollan vælferðarpolitikk. Kann eg vera ein hjálp í hesum arbeiðinum, so vil eg fegin tað, vísir Helena á.

## Flytir seg

Í samrøðu við Sosialin í gjár, segði tíðindamaðurin, John Johannessen, at hann metir seg sum ein sjálvsstýrissinnaðan javnaðarmann. Søguliga sæð hevur Javnaðarflokkurin vanliga havt trupulleikar við at hava ein greiða støðu til ríkisrættarliga spurningin.

Í flokkinum hevur bæði verið rúmd fyri sambands- og sjálvsstýrissinnaðum, og tí hevur Javnaðarflokkurin havt trupulleikar við at finna ein felags grundvøll viðvíkjandi ríkisrættarliga spurninginum. Síðan 1998, hevur Javnaðarflokkurin verið mótpolur til sjálvsstýrissinnaðu samgonguna, men við John Johannessen og Helenu Dam á Neystabø tykist sum um, at flokkurin møguliga erat flyta á hesum økinum.

*Er Javnaðarflokkurin tvíbýttur í sjálvsstýrismálinum?*

– Tað dugi eg ikki at siga. Eg haldi tað er meira ein spurningur um, hvat hvør einstakur brennir fyri. Limirnir í flokkinum hava nøkur felags mál, men tað er ymiskt frá limi til lim, hvussu stór orka verður løgd í tey ymisku málini. Persónliga leggi eg orku í at føra at ein optimistiskan og konstruktivan sjálvsstýrispolitikk, sum sjálvsagt skal vera í tráð við stevnumiðuni hjá Javnaðarflokkinum.

Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um tjóðskaparliga semju er í øllum førum sera greitt, sigur Helena Dam á Neystabø

## Hørð kapping

Vit skulu nógv ár aftur fyri at finna ein so sterkan javnaðarlista í Suðurstreymi, sum tann flokkurin hevur til løgtingsvalið hesaferð. Høvuðsstaðarøkið hevur aldrin verið mett sum ein háborg hjá Javnaðarflokkinum, men tað tykist sum um, at flokkurin hesaferð hevur brotið upp um armar, og lagt nógv fyri at fáa eitt gott val í Suðurstreymi.

Kappingin um tingsess í Suðurstreymi verður rættiliga hørð, har Katrin Dahl Jacobsen, Kristian Magnussen, John Johannessen og Helena Dam á Neystabø óivað verða millum stóru atkvøðuslúkararnir hjá Javnaðarflokkinum.

Ein áhugaverdur spurningur er, hvør fer at draga longsta stráið í kappingini um kvinnuligu atkvøðurnar í Javnaðarflokkinum. Á hesum økinum fara Helenu Dam á Neystabø, Katrin Dahl Jacobsen og Elin Lindenskov at kappast

*Skalt tú serliga kappast við Katrina um løgtingssessin?*

– Tað veit eg ikki. Eg ætli mær fyrst og fremst at arbeiða fyri flokkin. Tað er bara at fegnast, at fleiri nýggj fólk eru komin á javnaðarlistan, og vónandi hevur tað við sær, at flokkurin fær eitt gott val. Eg ætli at gera eitt so gott arbeiði fyri flokkin sum gjørligt, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur Helena Dam á Neystabø at enda.

Ein spennandi greipa ...




SKIPALISTIN 2004

hevur lógarkravdan føroyskan álmanakka, streymtalvur og streymkort umframt dagførdar upplýsingar og hópin av nýggjum myndum av føroyska flotanum. Tilfarið í SKIPALISTANUM er álítandi og viðkomandi hjá øllum teimum, ið hava áhuga fyri skipi og sjógvi.

*Skipalistin – hentur at hava!*

SKIPALISTIN 2004 kostar kr. 175,-
og innbundin kr. 240,-




JOHN DAM

er ein hin týdningarmesti skiparin og vinnulívsmaðurin í føroysku siglingarsøguni. Hann var undangongumaður í rækjufiskiskapinum, men eisini innan laksa- hummara- og skeljaveiðu gekk hann ótroddar leiðir. Hetta er ein lívssøga um áræði og framskygni, soltnar tíðir og gulltíðir, vónir og vónbrot, eydnu og lagnu. JOHN DAM er 400 blaðsíður við hópin av spennandi myndum.

Bókin er innbundin
og kostar kr. 295,-

– Fæst í bókabúðunum